UTTAN ÚR HEIMI

### Líka ringt í Afghanistan

Tað er ikki bara í Irak, at amerikanskir hermenn gera seg inn á fólk, sum teir taka til fanga.

Mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch sigur í einari frágreiðing, at framferðin er tann sama í Afghanistan. HRW vísir á, at fleiri amerikanskir hermenn hava fyrr greitt frá, hvussu illa fangar verða viðfarnir í teimum amerikonsku fangalegunum í Afghanistan, og at minst tríggir av fangunum doyðu, meðan teir sóru fangar hjá amerikanska herinum har.

Serligi Afghanistan-sendimaðurin hjá Human Rights Watch, John Sifton, sigur við tíðindastovuna AP, at felagsskapurin hevur fleiri ferðir fingið at vita frá afghanum, at amerikanararnir fara illa við fangum har. Hann sigur, at HRW hevur fleiri ferðir greitt amerikonskum embætismonnum frá hesum, men at einki er hent. Nú hevur stjórnin í Washington kortini gjørt av at kanna skuldsetingarnar.

### Hon skal ikki til Avstralia

Seinastu dagarnar hava bretsk bløð skrivað, at Maxime Carr, sum varð dømd í sambandi við morðið á tvær smágentur í Onglandi, skal hava fingið loyvi at búseta seg í Avstralia. Men tað avsanna avstralsku myndugleikarnir.

Sambúgvin hjá Maxime Carr, Ian Huntley, varð dømdur fyri at hava myrt Holly Wells og Jessicu Chapman. Rætturin segði, at Maxime Carr hevði ikki verið uppi í sjálvum morðunum, men hon bleiv dømd fyri at hava seinkað kanningararbeiðinum hjá løgregluni. Undir rættarmálinum bleiv avdúkað, at hon hevði logið fyri løgregluni fyri at verja sambúgvan.

Roknað verður við, at Maxime Carr verður latin leys um stutta tíð. Hon er longu sloppin úr fongslinum, men er í húsavarðhaldi í London. Tað er ikki alment kent, hvar hon býr, og bretsku fjølmiðlarnir rokna við, at myndugleikarnir fara at geva henni nýtt navn, tá honum stutta tíð sleppur leys.

### Drápsmaður horvin

Fyri góðum trimum árum síðani myrdi Anibal Antonio dos Santos mozambiska tíðindamannin Carlos Cardoso. Fyri morðið fekk hann 28 ára fongsul, men nú er hann brádliga horvin úr fongslinum.

Hetta er aðru ferð, at drápsmaðurin er flýddur. Fyrru ferð var í september í 2002, men í fjør varð hann tikin í Suðurafrika og fluttur aftur til fongslið í Mozambik. Men sunnudagin hvarv hann aftur. Norska Dagsavisen skrivar, at mozambiska løgreglan veit ikki, hvussu hann er sloppin úr tí sera væl varda fongslinum, men onnur hava illgruna um, at hann fekk hjálp til at flýggja.

Carlos Cardoso bleiv myrdur, beint eftir at hann hevði avdúkað svik í sambandi við eina bankagølu, og summir mozambiskir fjølmiðlar hava lagt nakrar politikarar undir at hava goldið dos Santos pening fyri at myrða blaðmannin. Herfyri skrivaði eitt av bløðunum, at drápsmaðurin var sinnaður at avdúka sannleikan um morðið, og fjølmiðlarnir halda, at tað kann hava samband við, at hann nú er horvin.

### Trupulleikar við myllum

Heimsins størsta vindmyllulund, sum er á Horns Rev úti fyri jútsku vesturstrondini, hevur ikki virkað eftir ætlan.

JydskeVestkysten skrivar, at ávísir tekniskir trupulleikar hava verið við vindmyllunum. Orkuveitingin frá teimum hevur heldur ikki verið nóg støðug, og tí hava eigararnir nú gjørt av at umvæla myllurnar. Tað fer at bera í sær, at ein ávísur partur skal takast úr øllum teimum 80 myllunum, og verksmiðjan Vestas skal so umvæla brekið. Tað er Vestas, sum hevur gjørt vindmyllurnar.

Verkætlanin á Horns Rev hevur kostað umleið tvær milliardir krónur, men úrslitið hevur ikki verið nóg gott, sigur elfelagið, sum fær streymin frá teimum 80 stóru vindmyllunum.

# Hon skal bøta fyri Rumsfeld

**Lynndie England kann fáa 15 ára fongsul fyri myndina, sum vísir hana við einum irakskum fanga í tjóðri. Verjar hennara siga, at hon gjørdi eftir boðum, og at hon nú er vorðin syndabukkur**

FANGAVIÐFERÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Lynndie England avmyndað við einum irakskum fanga í tjóðri. – Eg fekk boð frá mínum yvirmanni um at gera hatta, sigur hon*

*Myndir: Reuters*

Myndirnar av Lynndie England og naknum irakskum fangum eru farnar um allan heimin. Á einari av myndunum stendur hon við einum fanga, sum liggur í tjóðri á gólvinum.

– Hon fekk boð um at halda tjóðrinum, og at hon skuldi brosa, so aðrir irakskir fangar kundu sleppa at síggja myndina, sigur verji hennara, Georgio Rashadd við Washington Post. Hann heldur, at yvirmenninir bóðu Lynndie England halda tjóðrinum, tí hon var kvinna, og tí at hon var tann minsta av hermonnunum. Endamálið var at eyðmíkja fangarnar uppaftur meiri.

Sjálv hevur Lynndie England sagt sína hugsan við sjónvarpið KCNC.

– Tað vóru menn við hægri tign enn eg, sum bóðu meg halda tjóðrinum. Teir tóku eina mynd. Eg fekk at vita, at myndin skuldu nýtast til at "bloyta" aðrar fangar, og meiri veit eg ikki um hatta, sigur hon.

### Boð úr Pentagon

Janis M. Kapinski, generalur, hevði ábyrgdina av fongslunum í Irak. Hon hevur nú fingið eina átalu fyri tað, sum hendi í Abu Ghrainb-fongslinum í Bagdad, men tað vil hon ikki góðtaka.

Í einari frágreiðing til verjumálaráðið Pentagon skrivar hon, at tað var generalurin Geoffrey Miller,




sum gav boðini um framferðina ímóti fangunum. Miller hevði frammanundan verið leiðari í fangaleguni í Guantanamo í Kuba, men nú høvdu teir politisku leiðararnir í Pentagon gjørt av at senda hann til Irak fyri at fáa meiri burtur úr fangunum har, skrivar Janis Kapinski.

Verjarnir hjá henni og Lynndie England siga, at málið er meiri umfatandi, enn almenningurin hevur fingið varhugan av, og at tann endaliga ábyrgdin liggur nógv longri uppi í skipanini.

– Rumsfeld fjalir seg aftan fyri eina bóndadóttur, skrivar Washinton Post og sipar við hesum til Lynndie England.

# Krevja bretskan hermann dømdan

**Tann átta ára gamla Hanan doyði, eftir ein ein bretskur hermaður hevði skotið hana. Nú krevja foreldrini, at hermaðurin verður revsaður**

IRAK-KRÍGGIÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Bretska herleiðslan sigur, at tann átta ára gamla irakska smágentan Hanan Saleh Matrud varð rakt, tá ein bretskur hermaður skjeyt eitt ávaringarskot, men Amnesty International heldur uppá, at hermaðurin skjeyt hana við vilja.

– Vit krevja, at hasin hermaðurin kemur fyri rættin, og at hann verður dømdur, siga foreldrini við BBC.

Hanan varð rakt av einum skoti frá einum bretskum hermanni har suðuri í Irak tann 21. august í fjør. Hon doyði dagin eftir. Bretska herleiðslan sigur, at talan var um eitt óhapp, men fólk, sum vóru á staðnum, hava greitt frá, at hermaðurin siktaði, áðrenn hann skjeyt.

Aftan á drápið fingu foreldrini eitt bræv frá bretsku herleiðsluni. Har stóð, at gentan var rakt í sambandi við, at hermenninir høvdu skotið ávaringarskot eftir nøkrum unglingum. Eingin umbering stóð í brævinum.

Sambært Amnesty International er hetta tann vanliga frágreiðingin, tá sivilfólk verða rakt av skotum. Tey avvarðandi fáa lítið ella einki at vita, og tað sindrið, sum tey kanska fáa at vita, er ofta skeivt.

ítróttur

Nr. 91 • fríggjadagur • 14. mai 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Leikararnir stuðla FS-Vágum

**Sambært viðtøkum felagsins hevur Miðvágs Bóltfelag ikki heimild til taka seg úr samstarvinum FS Vágar, uttan so at hetta verður samtykt á aðalfundi**

FÓTBÓLTSSAMSTARV
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Nógv rumbul hevur verið í Vágum, síðani tað kom fram, at nevndin í MB hevði avgjørt at taka seg úr FS Vágum. Sum skilst er stór ónøgd um hesa avgerð, og nú er eisini komið fram, at nevndin í MB ikki hevur heimild til at steðga samstarvinum uttan eina serliga aðalfundarsamtykt.



*Enn er ógreitt, um Birgir Joensen liðskipari hjá FS-Vágum h.m. á myndini, og liðfelagar hansara sleppa at halda fram at spæla á felagsliðnum hjá FS-Vágum*

*Savnsmynd*

### Í stríð við viðtøkurnar

Í viðtøkunum fyri MB stendur, at felagið er limur í ÍSF, FSF og FS Vágum. Um Miðvágs Bóltfelag skal melda seg úr einum av hesum felagsskapum, skal hetta samtykjast á aðalfundi. Eisini stendur í viðtøkunum, at í minsta tveir triðingar av aðalfundinum skulu atkvøða fyri melda seg úr, og í minsta lagi 25 limir skulu verða til staðar á aðalfundinum, um hann skal verða viðtøkuførur. Hetta merkir sostatt, at avgerðin hjá nevndini í MB um at melda seg úr FS Vàgum er í stríð við viðtøkur felagsins og harvið ólóglig.

Vit royndu í gjár enn einaferð at fáa fatur á formanninum í Miðvágs Bóltfelag, uttan at hetta tó eydnaðist okkum.

Sum tað eisini hevur verið skrivað her í blaðnum fyrr í vikuni, kravdi nevndin í MB at fáa allar spurningarnar skrivliga, um hon skuldi úttala seg til Sosialin, og harafturat skuldi øll nevndin í Miðvágs Bóltfelag verða til staðar, tá ið spurningarnir skuldu svarast. Eitt telefaks var tískil sent vestur við nøkrum spurningum, men enn er einki svar komið aftur úr Miðvági.



### Stór ónøgd millum fólk í Miðvági

Ein av nevndarlimunum í FS Vágum er miðvingurin Bjarni Prior, sum eisini hevur drúgvar royndur sum aktivur leikari í bæði MB og FS Vágum. Hann sigur, at tað er stór ónøgd millum miðvingar um avgerðina hjá nevndini í MB. Bjarni Prior sigur, at fleiri miðvingar, millum annað hann sjálvur, hava síðani avgerðin kom fram, meldað seg úr Miðvágs Bóltfelag, og fleiri eru á veg at gera tað sama, sigur Bjarni Prior.

– Mangan hevur man kent seg einsamallan í felagsarbeiðinum í FS Vágum, tí ivi hevur verið um uppbakningin til felagið, sigur hann og leggur afturat, at hetta er alt gjørt fyri skommum síðstu dagarnar, men nú eru øll á gosi og stuðla FS Vágum, sigur Bjarni Prior.

Í Vágum hevur tað eisini vakt undran, at eingin í FS Vágum var kunnaður um avgerðina hjá MB, áðrenn hon kom fram í fjølmiðlunum. Heldur ikki eru leikararnir á felagsliðnum tiknir við upp á ráð og hava tískil ikki havt møguleika fyri at greitt nevndini í MB frá teirra sjónarmiðum.

*Stór ónøgd er millum bygdarfólkið í Miðvági um avgerðina hjá nevndini í MB um at taka seg úr FS-Vágum*

### Leikararnir stuðla FS Vágum

Mikukvøldið hevði nevndin í FS Vágum boðað leikarunum til fundar í Sandavági, og har fekk nevndin fyri felagsliðnum at vita, at allir leikararnir standa aftan fyri felagsliðið. – Tað var eingin ivi um, at leikararnir bakka fult upp um FS Vágar, og skuldi felagsliðið blivið upployst, vilja so at siga allir leikararnir umboða SÍF í landskappingini, sigur Bjarni Prior. – Spælararnir vóru á einum máli um, at teir vilja ikki spæla ímóti hvørjumøðrum, tí teir vilja stilla upp sum eitt lið, og kann tað ikki verða sum FS Vágar, so verður tað sum SÍF, sigur nevndarlimurin í FS Vágum.

### Arbeitt verður við eini loysn

Í løtuni arbeiða fólk í Vágum við at finna eina loysn upp á málið, og Bjarni Prior sigur, at í FS Vágum bíða tey eftir einum útspæli frá MB. – Vit hava enn ikki fingið nakað bræv frá Miðvágs Bóltfelag um útmeldingina, og tað haldi eg verða rættuliga løgið, sigur hann. Nevndin í SÍF, sum jú er saman við MB um felagsliðið FS Vágar, hevði enn ikki viðgjørt málið, tá vit tosaðu vestur hósmorgunin, tí formaðurin hevur verið uttanlands, men fundur var væntandi hóskvøldið, har málið skuldi umrøðast.

Sum skilst er ein loysn tó í eygsjón, men Bjarni Prior vil ikki koma nærri inn á, hvat hendan loysnin gongur út uppá. – Vit bíða framvegis eftir einum útspæli frá Miðvágs Bóltfelag, og tað besta hevði verið, um vit kundu funnið eina loysn, sum allir partar eru nøgdir við, sigur Bjarni Prior. Hann leggur afturat, at hann væntar ikki, at hetta fer at ávirka avrikini úti á vøllinum hjá felagsliðnum, tí tað hevði verið stórt spell.